# Aftur til Føroya við VINALÖGUM

Dupultfløgan VINALÖG hevur fingið framúr góða móttøku bæði í Føroyum og Íslandi, og komandi dagarnar vitja Jógvan Hansen og Friðrik Ómar fløguhandlar í Havn, Runavík og Klaksvík, har teir fara at framføra burtur úr fløguni og signera.

“Vit eru sera glaðir fyri móttøkuna, VINALÖG hava fingið bæði í Føroyum og Íslandi”, siga teir báðir Jógvan Hansen og Friðrik Ómar um dupultfløguna. Hon er seld í so stórum tali, at hon nærkast teimum 5.000 eintøkunum, sum skulu til fyri at verða heiðrað við gullfløgu í Íslandi.

“Tað vit vita, er hetta fyrstu ferð, at slíkt samstarv millum lond er roynt. Tí vóru vit spentir at vita, hvussu hetta fór at vera móttikið, at umseta tíggju føroyskar sangir til íslendskt og tíggju íslendskar sangir til føroyskt. Men allastaðni har vit eru komnir, hava fólk verið fegin um fløguna”, siga Jógvan og Friðrik, ið hava havt fleiri konsertir í Reykjavík og kring Ísland við VINALÖGUM. Teir hava eisini signerað fløgur í íslendskum fløguhandlum og tað sama koma teir nú til Føroya at gera.

Fullsett var í Norðurlandahúsinum, tá Jógvan og Friðrik høvdu konsert 24. oktober. “Tað var spennandi fyri okkum báðar”, sigur Jógvan. “Friðrik hevði ikki verið í Føroyum fyrr, og hóast eg havi spælt í Norðurlandahúsinum fleiri ferðir áður, so eru tað nøkur ár síðani, og hesaferð lá meira á mær. Men alt eydnaðist væl, og tað eri eg fegin um”, sigur Jógvan.

Góða móttøkan í Føroyum hevur fingið teir at koma aftur hendanvegin. “Vit fingu høvið at hitta fólk aftaná útgávukonsertina í Norðurlandahúsinum, men fingu ikki stundir at vitja føroyskar fløguhandlar tá, og tað vilja vit fegnir, eins og vit hava gjørt í Íslandi”, sigur Jógvan.

Friðrik og Jógvan fara at vitja fløguhandlar í Havn týsdagin, í Runavík og Klaksvík mikudagin og aftur í Havn hósdagin. Seinnapartin hósdagin vitja teir eisini íslendska aðalkonsulátið í Gongini í Havn, har teir heilsa uppá íslendingar og føroyingar, ið koma á gátt, syngja okkurt vinalagið og signera fløgur.



**Skráin**

**Týsdagin 15. desember**
Tórshavn kl. 16:00 TUTL í miðbýnum
Tórshavn kl. 17:00 SMS - Expert
Tórshavn kl. 19:00 SMS - Expert

**Mikudag 16. desember**
Runavík kl. 15:00 Elding í Runavík
Klaksvík kl. 16:30 Leikalund

**Hósdag 17. desember**
Tórshavn kl. 15:30 Íslendska aðalkonsulátið
Tórshavn kl. 16:30 TUTLhandilin í miðbýnum
Tórshavn kl. 19:00 SMS - Expert


Keypssamtøkan í Hoyvík



Slaktarin í Hoyvík sóknast eftir

**Fólki at pakka**

at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu

Vit eru deild í einum størri virki, sum er í støðugari menning. Vit sóknast eftir einum kvikum og álítandi fólki, sum er lætt at vera saman við, at pakka vørur í slaktaradeildini

**Arbeiðstíð**: 32 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag

Hevur hetta tín áhuga, hoyra vit fegin frá tær við skrivligari umsókn

**Løn**:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Lars Hansen, tel 314149 el. 281990

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
att: Lars Hansen

fk



Avgreiðslutíðir um jólini



Jólaaftan er stongt.

Frá **28. desember 2009 til og við 30. desember 2009** eru avgreiðslutíðir okkara broyttar soleiðis:

Móttøkurnar hava opið og telefonirnar verða tiknar **frá kl. 10 til kl. 12.**

Frá mánadegnum 4. januar 2010 verður opið aftur sum vanligt allar yrkadagar frá kl. 10.00 til 14.00 uttan fríggjadag, tá opið er frá kl. 10.00 til 12.00.

Sí annars **www.almannastovan.fo**

*Almannastovan ynskir viðskiftafólki sínum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.*

almannastovan

**Tórshavn** · Smyrilsvegur 20
Postrúm 3096 · 110 Tórshavn
Tel 35 35 10 · Faks 35 35 11

**Norðoyggjar** · Klaksvíksvegur 78A
Postrúm 296 · 700 Klaksvík
Tel 45 72 40 · Faks 45 72 41

**Eysturoy** · Heiðavegur 57
Postrúm 224 · 600 Saltangará
Tel 47 47 10 · Faks 47 47 11

**Suðuroy** · Sjógøta 3
Postrúm 58 · 800 Tvøroyri
Tel 35 35 60 · Faks 35 35 61

**Hjálpartólamiðstøðin**
Brekkutún 3 · 188 Hoyvík
Tel 358300 · Faks 358301

KREA · TEL 60 80 80